## Umrøða burðardygd

Viðurskiftini hjá veiðimonnunum í Grønlandi er evnið á ráðstevnu, sum verður í Nuuk í døgunum frá 18. til 22. februar. Har fara 75 innboðin at umrøða ymsar spurningar í sambandi við burðardygd hjá livandi tilfeingi, og hvussu hetta kann samskipast við altjóða reglur. Høvuðsspurningurin er, hvussu veiðimannavinnan skal skipast í framtíðini, og hvussu tað ber til at tryggja vinnuni so góðar fíggjarligar umstøður, at hon kann virka.



*Grønlendska veiðivinnan skal vera burðardygg (Mynd: KNR)*

# ráðgeving?

Hetta er ein verkætlan undir SamViti. Bitland arbeiðir mest við kleking av útflutnings- og vakstrarfyritøkum, har KT, gransking, vitan, og kreativitetur spælir ein stóran leiklut. Hetta meta vit vera eitt sera spennandi øki, sum vert er at gera íløgur í.

- Endamálið við samstarvsavtaluni millum Bitland og SamVit er at skapa serligar karmar fyri menning av nýggjum nýskapandi fyritøkum við at geva teimum íblásandi virkisligar karmar, har nýggir og meira royndir íverksetarar sita saman, og harvið lætta íverksetarunum at gongdina til fígging og ráðgeving í byrjanartíðini t.v.s. í fyrstu stigunum í verkætlanartilgongdini. Málið er sjálvandi at handilsgera teirra menningarhugskot og geva teimum ein sterkan platform at byggja sítt vakstrarvirksemi á.

- Tórshavnar Kommuna er eisini í ferð við at taka initiativir í mun til at stimbra íverksetan og bøta um umstøðurnar hjá íverksetarum í kommununi og hevur víst áhugað í at leggja kreftirnar saman bæði við Bitland og SamVit um at seta ein íverksetara- ella nýskapanardepil á stovn í Havn.

### Vakstrarmøguleikar

*Hvussu nógvar íverksetarar hýsir Klekingardepilin?*

- Á Klekingardeplinum eru í løtuni tríggjar fyritøkur við tilsamans 5 fólkum og ein bíðar eftir at sleppa inn. At klekja fyritøkur innan vitanarvinnuna er arbeiði, ið tekur langa tíð. Ofta ganga fleiri ár frá hugskoti til fyrsta faktura, men um tað eydnast, so er ofta gróðursett til stórar vakstrarmøguleikar.

- Av verkætlanum, sum eru og hava verið í Klekingardeplinum, og sum hava eydnast at koma í gongd, kunnu nevnast Simprentis, Auixillior á Tvøroyri og Føroya Sporførisskipan. Hetta eru alt fyritøkur, ið ikki hava Føroyar sum sín høvuðsmarknað, men eru føddar globalar og hava allan heimin sum marknað.

*Samstarvar SamVit við Íverksetarahúsið í Klaksvík?*

- Ja, vit hava ein leypandi dialog við tey, og vit ynskja avgjørt at samstarva enn tættari við Íverksetarahúsið í Klaksvík, tí tey eru ein týdningarmikil partur av heildarmyndini, men enn er ikki gjørd nøkur endalig skrivlig samstarvsavtala við Íverksetarahúsið.

- Vit kenna ikki til aktivitetsniveauið hjá Íverksetarahúsinum í æsir, men so vítt vit hava fingið upplýst, hava eini 60 fólk verið á skeið í 2007 – og vit vita um, at tey arbeiða við ítøkiligum verkætlanum, sum kunnu blíva til ítøkilig virkir. Eini fýra-fimm eru longu farin í gongd. Málbólkurin – ella brúkarabólkurin hjá Íverksetarahúsinum í Klaksvík er, so vítt vit hava skilt, í stóran mun yngri fólk, sum koma úr miðnámsskúlunum, og íverksetarar innan býarvinnur, kanska serliga í Klaksvík og økinum har um leiðir, men Íverksetarahúsið hevur ætlanir um at fevna um meira – eisini landafrøðiliga.

*Ein partur av uppgávunum hjá SamViti er at menna íverksetan innan ferðavinnu eisini?*

- Ja, ferðavinnan hevur vaksandi týdning, so íverksetaravirksemi innan ferðaog upplivingarvinnu er avgjørt eisini nakað vit arbeiða við. Tað er ein stór og vaksandi uppáva hjá SamViti – her hugsi eg um íverksetan, menning og nýskapan innan ferðavinnu, sum t.d. snýr seg um at gera ferðavinnuumstøðurnar betri, menna nýggj ferðavinnutilboð, gera kunningar- og tænastustigið betri ella menna góðskustýringarskipanir, sum skulu tryggja kundunum dygd og upplivingar.

- Tað, sum kanska er serliga spennandi, er menning, íverksetan og nýskapan av vinnuligum átøkum í útjaðaraøkjunum, sum SamVit metir vera eitt virðismikið tilfeingi serliga í ferðavinnuhøpi. Fleiri ítøkiligar verkætlanir eru í løtuni til t.d. at byggja gistingar- og upplivingardeplar ymsastaðni í landinum, sum SamVit stuðlar við ráðgeving og aðrari hjálp.

- Tíanverri hava vit ikki nógv at luta sundur til hvørt øki í Føroyum, tí játtanin er sera avmarkað og innsatsurin má eisini laga seg eftir initiativunum, tørvinum ella eftir áheitanunum, sum koma frá íverksetarum í økjunum. Men eingin ivi skal vera um, at menning av útjaðaranum verður raðfest høgt í SamViti.

### Rundferð í Føroyum

*Hevur SamVit annað í hyggju sum snýr seg um íverksetan?*

- Ja, avgjørt. Vit ynskja at varpa ljós á, hvussu vit best kunnu gagnnýta virði økkara í Føroyum, so vit hava t.d. ítøkiligar ætlanir í SamViti um at gera eina rundferð í øllum Føroyum her í vár, har fokus verður sett á eitt øki í senn. Ætlanin er, at øll økini hava haft vitjan av SamViti eftir umleið einum hálvum ári. Endamálið við rundferðini er m.a. at vitja fyritøkur og íverksetarar kring landið, fáa vinnuna í hvørjum øki í talu um teirra virksemi og íverksetan, at læra økið og virksemi í hvørjum øki at kenna og geva íblástur við at vísa á møguleikar fyri samstarvi, netverkan og felags átøkum fyri økið sum heild, og eggja til meira virkni í hvørjum øki, sum kann draga fólk til.

- Harnæst er ætlanin at gera nøkur felags tiltøk í heyst – saman við lokalu økjunum, har SamVit fer at luttaka í borgarafundum við fyrilestrum og skipa fyri øðrum tiltøkum – t.d. mentanarligum tiltøkum við lokalum talentum. Ætlanin er at samstarva við miðlarnar eisini um at varpa ljós á tey ymisku økini, tá vitjanin fer fram, og sostatt hjálpa til við at marknaðarføra økið og sjónliggera alt tað spennandi virksemið í økinum.

*Hevur SamVit nóg stóra játtan at arbeiða við til alt hetta?*

- SamVit ynskir at brúka játtan sína í stóran mun til íverksetararáðgevingarend amál og til annan íverksetarastuðul og menning og stuðul av aðrari vinnu, so sum eg her havi lýst tað – t.d. hjálp til útflutnings-, íløgu- og marknaðarátøk og menning av ferðavinnu, umframt uppbygging av netverkum – innlendis og altjóða.

- So um politikkararnir taka undir við hesum og ynskja, at vit skulu hepnast við at gjøgnumføra málini hjá okkum, so vóna vit sjálvandi, at tey eisini leggja neyðugu ressursurnar í tað, so tað veruliga kann koma okkurt munagott burturúr.

- Alt, sum eg havi nevnt í hesi samrøðu skuldi helst lýst tørvin á størri játtan. Men vit mugu aldrin gloyma, at – um rætt verður atborið – so kann virksemið hjá SamViti geva peningin fleirfaldað aftur til samfelagið! Hetta er peningur, sum kann fara til at lyfta aðrar tungar samfelagsuppgávur. Ein íløga í virksemið hjá SamViti er nemliga ein íløga í lunnarnar undir einari burðardyggari framtíð! endar Elin samrøðuna.



*Tá Menningarstovan og Ferðaráð Føroya gjørdust til SamVit. Kjartan Kristiansen, táverandi stjóri í Menningarstovuni, heilsar upp á Elin Heinesen, stjóra í SamVit*

*Savnsmynd*